# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Drál í innlitsmálum

Ein grundleggjandi fortreyt fyri vælvirkandi fólkaræði er vitan, kunning og innlit. Ein vælvirkandi og óheft pressa er í hesum sambandi ein fólkaræðilig fortreyt. Ein onnur fortreyt í hesum høpi er, at pressan, bløðini og aðrir miðlar hava atgeingi til tær upplýsingar, ið er neyðugar til tess støðugt at kunna veita almenninginum óhefta upplýsing og tíðindi. Pressan skal av innlýsandi grundum hava upplýsingar frá almennu fyrisitingini.

Fyrisitingin hevur sum uppgávu at umsita lóggávu og regluverk og at seta avgerðir hjá politisku myndugleikunum í verk. Í einum vanligum fólkaræði verða sett strong og stór krøv til fyrisitingina. Embætisfólkini, sum manna hesa fyrsiting skulu vera politisk og persónliga óheft og vælútbúgvin. Tey skulu síggja til, at allar avgerðir eru í samsvar við lógir, kunngerðir og siðvenjur. Til tess at tryggja borgarum og almenningi sum heild møguleika at fylgja við fyrisitingini og av fyriliti fyri rættartrygdini hava okkara politikarar eins og starvsfelagar teirra í flestu fólkaræðiligu londum samtykt lóggávu, ið tryggjar almenningunum innlit í fyrisitingina. Henda lóggáva var eitt stórt fólkaræðiligt framstig.

Tað er sjálvsagt, at einhvør stjórnarskrivstova hevur skyldu til at halda Løgtinslógina nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyristingina við seinni broytingum. Tað gongur oftast hampiliga væl at fáa avgreitt eitt innlitsmál, og vit hava varhugan av, at embætisfólkini hóast mangan ovbyrjað royna at liva upp til krøvini í innlitslógini. Hinvegin kemur tað tíverri meira enn so fyri, at myndugleikar ikki eftir okkara tykki liva upp til lógarkrøvini.

Hesar seinastu dagarnar hava vit sæð tvey greflig dømi um almennan myndugleika, ið drálar við at geva ávikavist Dimmalætting og Sosialinum innlit í ávís mál. Uttanríkisráðið hevur drigið umbønir so langt út og er komið við ónøktandi svari, at bladfólk okkara kendu seg noydd at fara til Løgtingsins umboðsmann, sum nú hevur givið Uttanríkisráðnum eina nøs, og Dimma hevur nú eisini kært málið. Tá vit koma í hesa støðu hoyra vit undanførslur um starvsfólkatrot, skeivar skrásetingar, gloymdar skrásetingar ella at umsóknin er so trupul, at hon má til løgfrøðiligar metingar.

Tað er torført at meta um hesar umberingar, og viðhvørt kann tað vera freistandi at hugsa, at hetta snýr seg um eitthvørt heilt annað, eitt nú, at politiska ella fyrisitingarliga leiðslan hevur nakað at dylja og tí tilviljað seinkar fyrisitingarligu tilgongdini. Hetta er eingin ákæra, men ein hugsan – ein tanki elvdur av líknandi málum úr okkara grannalondum, har dømini eru ikki so fá. Uttan mun til orsøkirnar, so verður hetta drál ikki góðtikið, tí hetta drál undirmáar týðandi partar av okkara demokratiska undirstøði. Vit fara tí eins og okkara starvsfelagar á Dimmalætting framvegis gjølla at fylgja gongdini í øllum innlitsmálum, og vit fara als ikki at góðtaka nakra roynd frá politiskari ella fyrisitingarligari síðu at útgata eina lóggávu, sum er ein hornasteinur í okkara fólkaræði.

**Sosialurin**

# Bitlandi týðandi leiklut fyri íverksetan og nýskapan í Føroyum

**PETUR F. ZACHARIASSEN**
nevndarformaður í p/f Bitland



**Bitland ger eitt gott og týðandi arbeiði fyri íverksetan og nýskapan í Føroyum. Ein høvuðsuppgáva hjá felagnum er at hjálpa íverksetarum at útvega fígging og at ráðgeva íverksetarum. Hesa uppgávu loysir felagið væl, so nevndin er nøgd við virksemið og stjóra felagsins**

Í einari greinarøð hevur Dimmalætting sett ljóskastaran á ráðgevarafyritøkuna p/f Bitland.

Niðurstøðan hjá Dimmalætting tykist vera, at Bitland og stjóri felagsins eru miðdepil í einari »stuðulskarrussel«, ið fyri tað mesta snarar runt við almennum skattakrónum.

Nevndin í p/f Bitlandi hevur við áhuga lisið greinarøðina, og nevndin heldur tað vera náttúrligt at koma við eini viðmerking.

**Nøgd við virksemi felagsins**

Í fyrsta umfari hevur tað týdning at staðfesta, at nevndin er nøgd við virksemi og stjóra felagsins.

Nevndin kennir ikki aftur myndina, ið Dimmalætting málar, av einari leiðslu, ið fyri egnan vinning situr báðu megin borðið, bæði tá kapitalur verður játtaður, og ráðgevast skal.

**Váðafúsur kapitalur**

Vert er at skilja, at tað er ikki Bitland, ið játtar pening til Bitland. Til eina og hvørja tíð eru tað teir játtandi myndugleikarnir (grunnar, stovnar o.o.), ið einsamallir taka avgerð um, hvørjar játtanir skulu latast.

Møguligar atfinningar um ymsar fyritøkur, ið fáa kapital játtaðan, skulu tí ikki rættast móti ráðgevarum sum Bitlandi. Tvørturímóti ger Bitland eitt gott arbeiði, um ein fyritøka fær játtaðan stuðul. Vit skulu minnast til, at ein høvuðsuppgáva hjá Bitlandi er at hjálpa íverksetarum at søkja kapital ymsastaðni frá.

Flestu munnu vita, at kapitalur til íverksetarayritøkur krevur at vera sera váðafúsur, tí váðin er stórur. Bert fáar verkætlanir eru veruliga burðardyggar og sjálvberandi, men tað er kortini alneyðugt at seta pening í íverksetan og nýskapan fyri at tað skal eydnast teimum fáu burðardyggu verkætlanunum at gerast veruleiki.

Tí er onki løgið í, at Bitland arbeiðir við at søkja pening, eisini almennan pening - tað er jú arbeiðið hjá Bitlandi.

**Avtalan við Kleking**

Dimmalætting finnist at avtaluni, ið Kleking hevur við Bitland um at lata skrivstovuhøli og ráðgeveratænastur til verkætlanir, sum fáa stuðul gjøgnum Kleking. Dimmalætting kallar gjaldið fyri hesar tænastur, sum Bitland letur, "stuðul" til Bitland.

Hetta er púra misskilt. Talan er um gjald fyri tænastur, ið Kleking keypir og Bitland selur! Tað kann ikki undra, at Bitland fær pening fyri hesar tænastur, tí frá Bitlandi fáa verkætlanirnar í Kleking bæði høli, skrivstovuhentleikar, ráðgeving o.s.fr. Partur av inntøkugrundarlagnum hjá Bitlandi er júst at veita skrivstovu- og ráðgeveratænastur.

Vit mugu staðfesta, at Kleking higartil hevur mett, at tænastan frá Bitlandi er í lagi. Annars var neyvan nøkur avtala. Til eina og hvørja tíð er tað upp til Kleking at gera av, um avtalan skal halda fram ella ikki. Hetta er ikki ein avgerð, ið Bitland tekur.

**Arbeiðsfriður er avgerandi**

Ein týðandi fortreyt hjá nýskapandi fyritøkum er, at tær fáa arbeiðsfrið at mennast og vaksa – um teimum skal verða lív laga. Tí vil nevndin í p/f Bitlandi ikki umrøða nakra ávísa fyritøku.

Hin vegin er tað okkara fatan, at royndirnar í felagnum higartil benda á, at arbeiðshátturin, ið bygdur er upp seinastu árini í hesum umhvørvi, kann geva góðan ávøkst.

Íverksetaraumhvørvið í Føroyum er eftir okkara tykki í menning, tó at samfelagsbúskaparliga gongdin í løtuni má sigast at geva eitt mótrák. Arbeiðið hjá Bitlandi man eiga sín lut í hesi menning.

Málið er sjálvandi nú sum áður, at veruligar fyritøkur, útflutningur, arbeiðspláss v.m. skulu spyrjast burturúr.

Nevndin undirstrikar enn eina ferð, at hon er nøgd við virksemi felagsins og vónar ikki, at verandi skriving kemur at skaða menningina av íverksetaraumhvørvinum í Føroyum. Feililøgur fara altíð at verða gjørdar, ikki minst innan íverksetan og nýskapan, men tað má ikki føra við sær, at ein ikki vil fíggja og stuðla íverksetarar.

Nevndin er vís í, at Bitland eisini frameftir er ein verdugur samstarvspartnari, bæði mótvegis tí privata og tí almenna geiranum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.